# Ilt er at blása og hava mjøl í munninum

HJALMAR NORÐBERG POULSEN



Fiskimálaráðharrin setir óhefta kanning í verk í samband við hendingina, tá Olshana fór til botns við fullari oljulast. Skal ikki koma við nakrari meining um júst hetta var kleyvarskapur ella ei, men heldur koma við nøkrum viðmerkingum til almenna hugburðin, sum eyðkennir Fiskimálastýrið og avleiðingar av avgerðum tess.

Sambært úttalilsum fiskimálaráðharrans er grundin til at henda sokallaða "óhefta kanning" skal setast í verk tann, at onki innlit fæst í samskiftið lagnudagin hin 3. august 2007, tá roynt var at bjarga strandaða russiska trolaranum.

Sum undanførsla frá Fjarskiftiseftirlitinum verður sagt, at tagnarskyldan heftir munnkurv, og lok er tí lagt á. Fiskimálaráðharrin vil vera við, at kanningin er alneyðug fyri at betra um trygdina yvirhøvur, serliga tá talan er um trygdina á sjónum. Tað ljóðar bæði tiltalandi og skilagott at dagføra føroysku tilbúgvingina, tí allur bati bøtir.

Harra ráðharri, tit eru so raskir at løggeva. Hví løggeva tit ikki á fjarskiftisøkinum? Tak lokið av aftur við lóg. Ella er Fjarskiftiseftirlitiðdanskt sermál? Tú pástendur samstundis, at trygdin í føroyska fiskiflotanum ikki á nakran hátt er í vanda. Hon er so góð, at ikki er neyðugt at halda galdandi sjófartslóg longur, men heldur broyta hana, soleiðis at maskintekniska manningin kann sparast burtur til frama fyri størri reiðarapart. Júst hetta borgar ikki fyri trygd.

Tú ert væl klárur yvir, at tú nú ert á veg í Tingið við einum lógaruppskoti, sum skal gera tað møguligt at manna føroysku maskinrúmini við ókvalifiseraðari manning samb. galdandi sjófartslóg.

Samstundis eru vit vitnir til at føroyskir maskinmeistarir í stórum tali hava fingið sær hýru við útlendskum fiskiskipum, har bæði arbeiðsumstøður og úrtøka eru munanandi betri enn á føroysku skipunum. Hetta er eisini galdandi tá avspáking fer fram. Hetta sigur okkum púra greitt, at málið átti at verið loyst á ein heilt annan hátt.

Pengar eru ikki trupulleikin, tí føroyska reiðaravirksemið fyrigongur við "Matador-stíli" og við skipaðum strámannavirksemi, har handlað verður við fiskiloyvum í trísiffraðum milliónaupphæddum. Hesi virðir sum tú og eg, ogn Føroya Fólks, áttu at lati komandi ættarliði okkara til livibreyð, fara á útlendskar hendur. Av umsitingarligum fuski fekk útlendskur reiðari, 12. tíma undan løgtingsvali, varandi fiskiloyvi. Júst henda tilgongd kundi legaliserast, tí "strámaðurin" var uppfunnin og juridiska líktornið stóð til at bresta av pínu. Alt hetta uttan at tú gongur við til at biðja landstýrismálanevndina kanna løgna tilburðin, sum fór fram tveir dagar undan valinum.

Má siga at eg øtist og undrist við, serliga nú aftan á at hann eisini hevur tikið um reyvina á Fiskimannafelagnum og greitt framt sáttmálabrot. Til síðst stungin av í altjóðasjógv við ivasomum siglingarloyvi.

Jú, mangt gongur fyri seg, sum ikki tolir dagsins ljós. "Eftir hornunum skalt tú tarvin taka". Men hvat er ein millión í mun til tær 40? Ikki nógv tá krónurnar allar skulu í eitt stórt opið hol. Men tær munnu ivaleyst fjálga gott, tá tær umsíður eru komnar í jakkafóðrið. Jú,- landstýrismálanevndin fær hóatalt okkurt at tríva í.

# Føroyskt fíggjareftirlit

SJÚRÐUR GUÐJÓNSSON



Løgmaður skrivar, at vit ikki kunna rokna við einum serfrøðingastovni á fíggjarøkinum. Hetta ger at væl útbúnir føroyingar, enntá við nógvum royndum, ikki kunna venda heimaftur at arbeiða. Fólk, sum okkara samfelag manglar í stóran mun.

Løgmaður "Føroya hægsta tign" skrivar í grein um føroyskt fíggjareftirlit:

"Talan verður ikki um, at vit skulu seta á stovn eitt fíggjareftirlit við kanska hálvthundrað serfrøðingum, sum onkur hevur róð framundir. Vit taka ábyrgdina, men fara ivaleyst at gera eina avtalu við eitt eftirlit, sum kann átaka sær hesa uppgávuna okkara vegna. Sannlíkt er, at endin verður, at vit gera eina avtalu við danska fíggjareftirlitið um, at tey røkja hesa uppgávu framyvir okkara vegna og fyri eitt gjald, sum tað almenna má gjalda."

Also vit skulu IKKI uppbyggja nakra føroyska serfrøði á økinum. Við øðrum orðum: Føroyingar í útbúgving sum búskaparfrøðingar, løgfrøðingar, hagfrøðingar v.m., skulu ikki gera sær nakra vón at sleppa heim aftur til Føroyar - í hvussu so er ikki um tað stendur upp til Løgmann. Heldur ikki teir føroyingar, sum í løtuni starvast millum annað í danska fíggjareftirlitinum. Allarhelst er ein stórur partur kvinnur, sum vit í Føroyum mangla so dyggiliga. Hesir føroyingar í útlegd eru fólk, sum við sínum royndum og útbúgvingum kundu ført Føroyar framá m.a. á altjóða fíggjarmarknaðinum.

Gud viti hvat okkara kosnu fólk hugsa fyri sær. At renna ørindi fyri okkurt hissini gleps frá ávísum konservativum fólkatingslimi, sum bert hevur eitt í kvittanum - tað at Føroyar við húð og hár verða innlimaðar í danska statin skjótast gjørligt.

Nei, mítt uppskot er at vit gera eina avtalu líknandi tí, Skipaeftirlitið hevur um føroysk sjóvinnubrøv. Ein líkastillingsavtala, sum í hesum førinum loyvir danska sjóferðslustýrinum ígjøgnum eina dygdarmenningarskipan at auditera (skoða) Skipaeftirlitið og øvugt.

Við at brúka eina líknandi skipan, kundu vit uppbygt ein føroyskan serfrøðingastovn, sum so kundi verið auditeraður (skoðaður) av danska fíggjareftirlitinum. Kanska kundi tað enntá hugsast at skoðanin var gjørd sínamillum.

# Húsamarknaðurin skal regulerast við lóg

JOHN JOHANNESSEN
Form. Javnaðarfloksins á tingi



**Hugskotið hjá Bjørt Samuelsen um, at brúkaraumboðsmaðurin eisini skal hava eftirlit við húsamarknaðinum er gott. Men fyrst má húsamarknaðurin skipast bæði við lóg um meklaravirksemi og við lóg um keyp og sølu av fastari ogn**

"Vit skulu við lóg tryggja rættindi og skyldur í samband við keyp og sølu á bústaðarmarknaðinum, m.a. við lóg um fastognarkeyp, har eitt nú støðulýsing verður kravd, og við lóg um húsamekling, ið skal skipa umstøðurnar í sambandi við keyp og sølu gjøgnum húsameklarar."

Soleiðis verður sagt í vælferðarpartinum av Visjón 2015. Hesi orðini vil Javnaðarflokkurin eisini fegin taka til sín og gera til síni egnu. Tí neyðugt er rætta uppá tað óskil, sum í løtuni serliga gongur fyri seg á bústaðarmarknaðinum í høvuðsstaðarøkinum.

Ì miðstaðarøkinum er tað eftirhondini ógvuliga torført hjá ungum at fáa føtur undir egið borð. Serstakliga trupul, fyri ikki at siga ómøgulig, eru viðurskiftini hjá ungum barnafamiljum, ið ynskja at seta búgv og byrja eitt lív sum familja í miðstaðarøkinum. Marknaðurin er einans seljarans og meklarans marknaður, meðan keyparin stendur fullkomiliga einsamallur við lítlari og ongari rættartrygd.

Tí er neyðugt skjótast gjørligt at fáa skipað hetta økið við lóg. Støðulýsing eigur at verða krav, eins og ásetingar um saknktiónir í sambandi við skeiva støðulýsing eiga at vera krav. Somuleiðis eigur ognarskiftistrygging at vera eitt krav. Harumframt er stundin komin, at krøv verða sett til meklaravirksemi.

# Ung við epilepsi í Miðlahúsinum

**Í annaðkvøld fara ung við eplilepsi at greiða frá sínum royndum við sjúkuni. Tiltakið verður í Miðlahúsinum í Vágsbotni**

EPILEPSI
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Epileptikarafelag Føroya skipar í annaðkvøld fyri tiltaki í Miðlahúsinum, har kunna verður um, hvussu tað er at hava epilepsi sum ungur.

### At liva við epilepsi

Tað serliga við at hava epilepsi sum ungur er, at hetta er eitt tíðarskeið í lívinum, sum framman-undan er merkt av stórari óvissu. Støðuga hóttanin um enn eitt epileptiskt herðindi kann tí gera tann unga enn meir ótryggan.

Soleiðis sigur Bjarki á Rógvi Hansen, neurologur, ið fer at greiða nærri frá ungum og epilepsi týskvøldið í Miðlahúsinum.

Úr Danmark kemur 27 ára gamli Mads Boe at greiða frá, hvussu tað var at fáa staðfest epilepsi sum 18 ára gamal, og hvussu hann í dag livir eitt virkið lív.

Eisini fer 20 ára gamla Ása Súnadóttir av Skála at siga eitt sindur um, hvussu tað var at fáa staðfest epilepsi fyri trimum árum síðani.

Á fundinum verður eisini høvi hjá áhoyrarnum at seta spurningar.

Tiltakið byrjað klokkan 19.30




*Í anna'kvøld verður tiltak í Miðlahúsinum, har høvi verður at hoyra um, hvussu tað er at hava epilepsi sum ungur*

# Gamal grindahjallur verður fornminni



*Gamli grindahjallurin hjá prestagarðinum í Jansagerði verður nú varðveittur sum fornminni*
*Mynd: Fróði Poulsen, www.vagaportal.fo*

**Menn eru farnir undir at umvæla gamla grindahjallin hjá prestagarðinum í Jansagerði, nú avgerð er tikin um at varðveita hjallin sum fornminni**

FORNMINNI
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Nakrir ungir menn úr Miðvági, ið hava áhuga fyri fornminnum, hava tikið stig til at varðveita sokallaða Stóra Hjall í Miðvági sum fornminni.

Talan er um ein gamlan hjall, sum altíð hevur verið brúktur til at goyma grind í.

### Samstarv

Arbeiðið við at varðveita Stóra Hjall verður gjørt í samstarvi við Fornminnafelagið og Miðvágs Kommunu, sum hevur latið tilfarið til at umvæla hjallin.

Tað er Nótafelagið við Kirkjar í Miðvági, sum eigur hjallin, ið upprunaliga hoyrdi til prestagarðin í Jansagerði.

Tí hevur hjallurin í nýggjari tíð eisini verið róptur Nótahjallurin við Kirkjar.

Tað í stóran mun eftirkomarar hjá teimum, ið áttu Nótafelagið, sum hava verið við í arbeiðinum at umvæla og varðveita hjallin.

Úr Miðvági verður sagt, at arbeiðið at umvæla hjallin gongur væl. Nú er bert eftir at leggja flag á takið og at hampa økið rundan um.